# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2023/2024



# SPURDÓMUR HVÍ ERU SO NÓGVAR REYÐMAÐKAR Í BARNAGARÐINUM Í KVÍVÍK?



Granskarar: Boas Eirikur Høgnason, Andras Jákupsson svarthamar, Sanna Jógvansdóttir Danielsen, Kira Soon Rassmusen, Helena Hust Petersen og Daniel Shemesh.

# INNGANGUR

Stutt um arbeiðið og frágreiðingina

Vit hoyrdu frá læraranum at tað vóru nógvar reyðmaðkar í barnagarðinum og tí vildu vit kanna hví tað var so.

Lærari: Hilda Torklisdóttir, Maria Hammer Matrads og Trina Eysturoy

Teldupostur:

Luttakarar: Boas Eirikur Høgnason, Andras Jákupsson Svarthamar, Sanna Jógvanssdóttur Danielsen, Helena Hust Petersen, og Kira Soon Rasmussen, og Daniel Shemesh,

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD

1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Leggið eina ætlan

4. Savnið upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sigið øðrum frá

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Hví eru tað so nógvir reyðmaðkar í barnagarðinum í kvívík?

# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit halda at tað er tí at moldin er vát og tað drippar vatn niður frá steinunum, sum eru runt um barnagarðin.

# 3. LEGGIÐ EINA ÆTLAN

Fyri at finnað útav hví tað eru so nógvir reyðmaðkar í barnagarðinum í Kvívík hava vit sjálvi verið og leita í barnagarðinum um har vóru nakrir reyðmaðkar. Vit valdu at fara at kanna trý onnur støð í bygdini, fyri at samanbera innihaldið í moldini. Vit tosaðu eisini við fleiri fólk fyri at vita hví tað sigst at nógvir reyðmaðkar eru í barnagarðinum.

# 4. SAVNIÐ UPPLÝSINGAR





Vit savnaðu mold frá skúlanum, barnaðgarðinum, og frá ánni við síðinar av barnaðgarðinum og vit kannaðu eisini moldina fyri at vita um nakrar maðkar vóru í tí moldini, men vit funnu ongar reyðmaðkar, men vit funnu tvær lítlar ormverur og eina tvístertu.

Tey sum arbeiðdu í barnagarðinum søgdu at reyðmaðkarnir ofta dottu niður frá flag takinum. Vit tosaðu eisini við húsavørin og hann segði at tað vóru nógvir reyðmaðkar á takinum tí at flag takið var frá leynnavatn og at har eru nógvir reyðmaðkar.

Ein lærari í skúlanum segði at reyðmaðkar eru í bønum tí at seyðir eru har og har sum seyður er, er nógv seyða tøð og reyðmaðkar finnast ofta í seyða tøð.

Pápi hjá einum í bólkinum hevði fortalt at man finnur nógvar maðkar uttanfyri einum seyðafjósið, so kom beiggin hjá einum í bólkinum og hevði funni fleiri maðkar og vit sluppu at taka teir við skúla

at kanna teir og tá vit vóru liðug at kanna teir, koyrdi lærarin hjá okkum teir í kompostin hjá okkum.

# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Tað sum vit komu fram til var at grundin til at teir detta frá takinum í barnagarðinum er tí at flag takið er frá Leynavatni og har eru nógvar reyðmaðkar.

Vit funnu eisini útav at reyðmaðkar finnast nógv har seyða lortur er.

# 6. SIGIÐ ØÐRUM FRÁ

Vit ætla at koyra hetta út á heimasíðuna hja Kvívíkar skúla.

# FYLGISKJØL

1.

2.

3.